## Kupik barsilsfarloyvi

Grønlendski fólkatingsmaðurin Kupik Kleist, hevur fingið barsilsfarloyvi frá Fólkatinginum, men hann noyðist at fara langt niður á listan hjá flokki sínum, AI, fyri at finna ein at møta fyr seg. Fyrsti varalimurin, Georg Olsen, hevur borið seg undan. Annar varalimur er Aviaja Vandersee, men hon kann ikki møta, tí tað er hon, sum gongur við barninum hjá Kupik Kleist. Triði varalimurin, Sofie Rossen, hevur hinvegin sagt ja.

## Prísurin avgerandi

Ein donsk kanning vísir, at prísurin hevur mest at siga, tá danir keypa nýggjan bil. Síðani hugsa fólk um útsjónd og útgerð, meðan tey hava lítlan áhuga í, um bilurin dálkar meiri ella minni enn aðrir. Ein bilasølan í Århus hevur í seinastuni bjóðað fólki reinsifiltur fyri 4.000 krónur, men hóast bilurin kostar 219.000 krónur frammanundan, halda fólk tað vera ov nógv at rinda 4.000 krónur afturat fyri at tryggja, at hann dálkar minni.

Skyn:

# Gjøgnumskygni og trúvirði á marknaðin

**Í dag læt nýggja ognarmeklarafelagið hjá Føroya Banka, Skyn, upp. – Vit ynskja størri gjøgnumskygni og trúvirði millum partarnar, sigur stjórin Torgun Davidsen**

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




**Fakta um Skyn:**
Stovnað 17. november 2006
Føroya Banki eigur fyritøkuna
Torgun Davidsen er stjóri

*Maiken á Mýrini, Torgun Davidsen, Súni Schwarz Jacobsen og Janus Petersen uttan fyri hølini í Tórsgøtu*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað var ein fegin Janus Petersen, sum í morgun greiddi frá nýggju fyritøkuni hjá Føroya Banka.

– Hetta gera vit fyri at kunna veita eina betri heildarveiting til kundarnar.

– Vitan, lærdómur og skynsemi er tað, vit vilja standa fyri segði Janus Petersen og vísti síðani til stjóran í Skyn, Torgun Davidsen, sum er einasti virkni útbúni húsameklarin í Føroyum.

Hon segði, at Skyn fer at selja hús, vinnubygningar og grundøkir. Teir fara at ráðgeva seljarum, men høvuðsdentur verður lagdur á søluna, segði Torgun Davidsen.

### Vilja seta dagsskránna

Fyri jól í fjør kom fram, at Føroya Banki fór undir bústaðarmekling, og nú fyritøkan fer at virka, eru 16 ognir til sølu. Tað eru tey í fyritøkuni væl nøgd við. Torgun Davidsen, stjóri, sigur, at tey ynskja størri gjøgnumskygni og trúðvirði millum partarnar. Hon og Maiken á Mýrini reka Skyn, og komandi mánað verður eitt starvsfólk aftrat knýtt at fyritøkuni, sum sigur seg vilja seta dagsskránna á føroyska ognarmarknaðinum.

– Vit vilja ganga á odda at gera ognarmarknaðin gjøgnumskygdan. Vit vilja skapa varandi nøgdsemi millum kundarnar við persónligari ráðgeving, og vit vilja vera fremst við fakligari vitan, staðfesti Torgun Davidsen.'

### Upplýsa altíð sølupris

Hon vísti síðani fjølmiðlunum nýggju heimasíðuna hjá Skyn. Har vera ognirnar lýstar við myndum, og eisini eru plantekningar, sum vísa hvussu ognin er innrættað. Á heimasíðuni eru eisini kort sum siga, júst hvar ognin liggur.

Á heimasíðuni stendur eisini eitt prísuppskot fyri hvønn bústað, og tað setur Skyn sum krav fyri at tey sleppa á heimasíðuna.

## Støðulýsing er krav

Sum nakað heilt nýtt krevur Skyn eina støðulýsing av ognini, sum tey skulu selja

– Hvørja ferð ein ogn verður seld gjøgnum okkum, fær keyparin eina óhefta støðulýsing (tilstandsrapport, blóm.) av ognini. Hetta er ein góð trygd, tí so veit keyparin, hvat hann fær, um so talan er um eina góða ella minni góða ogn. Hetta er eisini góð trygd fyri seljaran, tí hann kann kenna seg tryggan við, at sølan ikki kemur aftur um brekku, sigur Torgun Davidsen.

Hon legði aftrat, at higartil høvdu kundarnir bara fegnast um hesa mannagongd.

Tað er Landsbyggifelagið, sum skal gera støðulýsingarnar fyri Skyn. Á henda hátt siga tey seg tryggja, at støðulýsingarnar eru væl úr hondum greiddar og óheftar. Kortini veita støðulýsingarnar ikki nakra fullkomna trygd fyri, at ognin er í lagi, men tær lýsa verandi støðu samsvarandi tí, sum er sjónligt.

## 346 gramm av hassj umborð á Froyu

**Tollvaldið og løgreglan funnu leygarmorgunin 346 gramm av hassj umborð á línubátinum Froya. Skiparin gjørdi av leggja at á Havnarmola og fáa bátin kannaðan, og tað var púra beint, sigur Bergleif Brimvík**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Leygarmorgunin kom línubáturin Froya til Føroya eftir at hava verið í dokk í Hirtshals, har ymsar umvælingar og moderniseringar eru gjørdar. Á veg til Klaksvíkar valdi skiparin at leggja at við Havnarmola, fyri at fáa skipið kannað ígjøgnum, áðrenn tað kom norður.

Bergleif Brimvík, leiðari fyri kriminaldeildina hjá løgregluni, sigur, at skiparin gjørdi púra beint, tá hann valdi at leggja at Havnarmola og fáa eitt fullkomið eftirlit av skipinum.

Tollvaldið og løgreglan fóru umborð við narkohundum og gjørdu kanningar, og har komu teir fram á 346 gramm av hassji. Løgreglan fer nú víðari við málinum og ein maður, sum er føroyingur, er skuldsettur fyri at hava smuglað hassjið.

# Bilur stolin í Suðuroy

**Nakrir norðingar høvdu verið í Suðuroy um vikuskiftið. Har komu teir fram á ein ólæstan bil har lyklarnir stóðu í. Freistingin gjørdist ov stór, teir tóku bilin, koyrdu avstað og rendu út av**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Klokkan var farin beint av trý leygarmorgunin, tá nakrir mans komu framvið Statoilstøðini í Vági. Har stóð ein ólæstur bilur við lyklunum í. Fyri norðingarnar var freistingin ov stór, teir tóku bilin og fóru avstað við honum.

Góðar 40 minuttir seinni var bilurin funnin. Klokkan 3.45 fann løgreglan bilin í Tjalduvík, sum er beint sunnanfyri Øravík. Løgreglan sigur, at menninir vóru druknir og umframt at hava stolið bilin, verður førarin eisini ákærdur fyri rúsdrekkakoyring.

Eisini aðrastaðni í landinum vóru fólk tikin við ov høgari promillu. Í Vágum, Klaksvík og Havn vóru førarar tiknir, sum høvdu drukkið ov nógv.

### Fótpatruljan úti

Annars hevur vikuskiftið hjá løgregluni verið friðarligt sum so. Í høvuðsstaðnum var løgreglan farin út úr bilinum og var úti til gongu millum fólkið. Tvær ferðir fóru teir ímillum, har fólk vóru vorðin ósamd, men annars var lítið at gera hjá teimum.